# – Eg havi mangan ynskt meg aftur til skips

*Fyri tveimum árum síðani fór Símun Akursmørk í land av Enniberg og byrjaði sítt egna bakarí frá ongum. Nú hevur hann eitt av stóru bakarínum í landinum og eini 12 fólk í arbeiði*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tá hann fyri tveimum árum síðani byrjaði við sínum bakaríi í Klaksvík, hevði hann trupult við at fáa fígging.

Tvey ár seinni hevur hann keypt størsta bakaríið í býnum og hevur 12 fólk í starvi.

Símun Akursmørk er stóri bakarin í Klaksvík, og tað er hann vorðin eftir tvey strævin ár, har hann hevur arbeitt størsta partin av døgninum.

– Tað er ómetaliga strævið, og eg havi mangan ynskt meg aftur til skips, síðani eg fór at baka aftur fyri tveimum árum síðani, sigur hann.

Bakaríið hjá Símun heldur nú til í Nólsoyar Páls gøtu, og har verða hvønn dag bakað eini 1000 breyð, umframt alt annað, sum hoyrir til eitt bakarí. Símun letur eisini bakstur til allar uttan tveir handlar i norðoyggjum, og í teimum tveimum sølubúðunum, sum hann hevur í Klaksvík, støkkir eisini nógv fólk inn á gólvið.



– Arbeiðstíðirnar eru keðiligar, og tað er mangan ein kampur at koma á føtur, sigur Símun Akursmørk, sum bakar breyð og kakur til klaksvíkingar.
**Mynd: JH**

### Fyrsta royndin miseyndaðist

Men alt byrjaði, tá Símun Akursmørk fór í læru hjá Eiler Samuelsen í 1984 - hetta var beint eftir, at hann var liðugur við 10. flokk.

Í 1988 var Símun útlærdur, og stutt eftir fór hann í gongd við sítt egna bakarí. Men hetta gekk ikki væl, og tá eldur kom í bakaríið í 1990 avgjørdi hann at gevast.

Símun fór síðani til Danmarkar á sjófartsskúla, og hann sigldi úti næstu árini.

– Fyrsti kjansurin er fekk var við einum farmaskipið, sum sigldi lóður úr USA til persiska flógvan, har kríggj var. Tað var ein rættiliga øðrvísi og spennandi uppgáva, og alt skuldi verða so loyniligt, greiðir Símun frá.

Í 1993 fór hann við Enniberg sum kokkur og var umborð næstu fimm árini. Í 1998 fór hann í land, og tað var tá, at hann fór aftur at royna seg sum bakari.

– Eg byrjaði bakaríið við teimum pengunum, sum eg hevði forvunnið, meðan eg var við Enniberg. Eg royndi at fáa fígging, men tað gekk illa, greiðir hann frá.

### Virksemið tvífaldaðist

Símun yvirtók bakaríið hjá Verner, og hann byrjaði frá so at siga ongum. Nakrar mánaðir eftir, at hann var byrjaður lat hann handil upp í Akursmørk, haðani hann fór at selja bakstur til klaksvíkingar.

– Tað hevur gingið væl, og tá eg fyrr í ár aftur royndi at fáa lán til at keypa bakaríið hjá Eiler, var tað eingin truplleiki, tí eg hevði tveir góðar roknskapir at vísa á, sigur Símun.

1. juli yvirtók Símun bakaríið í Nólsoyar Páls gøtu, og síðani hevur virksemið hjá honum verið tvífalt so stórt, sum tað var frammanundan.

– Kanska hevur tað gingið ov skjótt fyri seg, tí eg havi ikki havt nakra serliga tíð til at umstilla meg í. Men hetta er spennandi og avbjóðandi, tí alt skal bara verið í lagi við vørunum, søluni og útkoyringini, sigur hann.

– Hetta hevði heldur ikki latið seg gjørt uttan ein konu, sum hevur stuðlað og hjálpt allatíðina. Allir bakarar kenna tað aftur, hvussu týdningarmikið tað er at hava hjúnarfelagan afturat sær.

### Egnar uppskriftir

Í løtuni eru tvey bakarí í Klaksvík, men fyri nøkrum fáum árum síðani vóru tað fýra.

– Tað er passaligt við tveimum bakaríum í Klaksvík, og tað rokni eg við, at tað eisini fer at vera í framtíðini, sigur Símun Akursmørk, sum fegnast um at hava ein blíðan kappingarneyta, sum javnan bjóðar kaffi og eitt prát.

Munur millum tey ymsu bakaríini eru ikki nógvur, tí vørurnar líkjast sær sjálvum. Men allir bakarar hava sínar egnu uppskriftir og soleiðis er eisini hjá Símun.

– Fólk siga seg ofta kunna smakka mun ímillum breyð hjá teimum ymsu bakarunum, og tað er ivaleyst eisini munur. Vit koyra allir tað sama í, men tað er helst eitt sindur av muni á, hvussu nógv vit koyra av hvørjum, og hvussu rávørurnar eru, sigur hann.

– Tað er einki loyniligt við mínum uppskriftum, men eg geri til dømis breyðini á tann hátt, sum eg haldi at fólk vilja hava tey.




*Fyri tveimum árum síðani byrjaði hann frá ongum, nú hevur hann samanlagt 12 fólk í starvi.*
**Mynd: JH**

### Bara ikki lagkøkubotnar

Bakaralívið er øðrvísi enn so nógv annað, tí arbeiðstíðirnar gjarna eru, tá onnur fólk sova.

– Arbeiðstíðirnar eru keðiligar, og tað er mangan ein kampur at koma á føtur, sigur Símun Akursmørk, sum fer til arbeiðis á midnátt og er til arbeiðis til seinnapartin dagin eftir.

– Tað er ofta møtimikið at fara í gongd, men tá tú so ert komin upp og ert farin til arbeiðis, so gongur tað altíð alíkavæl.

– Eg arbeiði rættiliga nógv, fái ikki altíð so nógvan svøvn, og eg síggi alt ov lítið til børnini. Familjulívið hjá bakarum er eitt sindur øðrvísi enn hjá teimum flestu. Men vónandi fái eg meira tíð til børnini og familjuna í framtíðini, sigur hann. Símun hevur verið giftur í fimm ár og eigur tvey børn.

Tá hann verður spurdur, um tað er nakað, sum hann tímir serliga væl at baka, svarar hann:

– Eg veit ikki rættiliga, men eg kann í hvussu so er siga, at eg orki ikki fyri at baka lágkøkubotnar.

– Eg havi fingið ein nýggja maskinu, sum kann seta myndir á køkurnar, og tað er rættiliga stuttligt at arbeiða við, tí tað er so nýtt og forkunnugt, sigur hann.

Og á størsta bakarínum í Klaksvík – og eitt av teimum stóru í landinum - er nóg mikið hjá Símun at takast við, og hann smæðist ikki burtur fyri sjálvur at tríva í okkurt á bakarínum, har tríggir sveinar og tveir lærlingar baka hvønn dag.

Sjálvt ikki tá tað eru lagkøkubotnar.



# Er babba pápin?

*DNA-royndir vera brúktar sum ongantíð áður av pápum í USA og eisini Evropa, sum vilja vera heilt vísir í, at babba er ein genetiskur pápi. 30 prosent av royndunum bera boð um tað øvugta*




**Modelmynd**

NICLAS JOHANNESEN

Tíðindini um, at sonurin Raul hevði cystiska fibrosu vóru av sonnum sorgarboð fyri jarnbreytar-teknikkaran Morgan Wise. Maðurin frá Texas vildi gera alt fyri sjúka sonin, og tá læknarnir spurdu, um hann vildi taka ein DNA test at fáa greiði á upprunanum til sjúkuna, var Morgan fúsur sum fáur.

Úrslitini frá kanningunum komu aftur negativ. Orsøkin til, at eitt barn fær systiska fibrosu er, at bæði foreldrini bera sjúkuelvandi genið í sær. Wise var ikki ein berari av systiskari fibrosu. Boðini frá læknunum góvu honum skelk.

Hetta merkti, at hann var heldur ikki biologiski faðir at Raul.

### Babba?

Wise var longu skildur frá konuni og hansara fýra børnum. Hann valdi nú at taka eina DNA-roynd, ið fór at vísa, um hann var faðir at Rawl og hinum trimum systkinum.

Úrslitini vístu, at hann var bert faðir at dóttrini - elsta barnið í 13 ára langa hjúnabandinum. Teir tríggir dreingirnir vóru ikki hansara biologisku synir.

– Tað kann ikki sigast í orðum, hvussu eg kendi tað. Hetta var sum at uppliva ein brádligan deyða. Eg kundi ikki í míni ringastu marru ímyndað mær, at hon - konan – hevði snýtt meg so dyggiliga í so mong ár. Mítt lív fór í knús. Ikki við mínum besta vilja skilji eg, hvussu ein mamma kann gera hetta móti hennara hjúnabandi, hennara manni, hennara børnum og liva í eini lygn, segði ein sera snópin Morgan Wise.

Wise, sum framvegis fatar seg sjálvan sum faðir at dreingjunum, er nú í beiskum, drúgvum sakarmáli við fyrrverandi konu sína. Hann sigur, at hann vil fegin hjálpa børnunum. Men ikki gjøgnum hana. Síðst í mai mánaði avgjørdi rætturin í Texas, at hann sleppur ikki at síggja síni børn, so leingi sakarmálið stendur við.

Dreingirnir, sum hann helt vera hansara, teljast millum túsundtals onnur ósek offur, sum rekast eftir í kjalarvørrinum á vaksandi DNA-ídnaðinum. Bæði í Evropa og Amerika gera illgrunasamir menn sær dælt av nýggju tøknini - og kunnu skjótt og lætt fáa prógv fyri, um teir nú veruliga eru biologisku páparnir.

Í USA verða gjørdar fleiri enn 250.000 royndir árliga, meðan 15.000 royndir verða gjørdar í Bretlandi. Nakrar av hesum royndum eru sprotnar úr ósemjum um foreldrarætt og eisini um arv. Haraftrat eru fleiri av kundunum giftir menn við einum illgruna.

Ofta eru úrslitini óynskt og skelkandi tíðindi. Umleið 30 prosent av monnunum, ið taka hesar DNA royndir fáa boðini um, at teir eru ikki pápar til tað, teir hildur vera teirra barn. Granskarar meta, at í tí stóra høpinum er eitt út av hvørjum 20 børnum eru ikki eftirkomarar hjá tí manninum, ið heldur, at hann er faðirin.

### Sensationalisma

Nýggja gen-tøknin hevur eisini gjørt vart við seg innan undirhaldsídnaðin. Allan Gelb er ikki nakar lækni. Hann kallar seg sjálvan immuno-hematologist. Allan rekur eina alsamt vaksandi gen-roynd fyritøku í New York. Hann ger rúgvu av royndum hvørja viku og nú hava DNA-royndirnar eisini gjørt hann til eina sjónvarps-stjørnu. Við stórum skeggi og brillum er hann fastur fúsur í sensatiónshungrandi ‘talk showum’, har hann almannakunnger úrslitini fyri fólki, ið tikið hava royndirnar. Jú meira skakandi og týnandi úrslit, tess fleiri hyggjarar eru tryggjaðir.

Herfyri fingu eini hjún at vita frá Gelb, ‘live on air’, at teirra royndir vístu, at tey vóru bróðir og systir.

Í Bretlandi eru DNA royndir eisini dagligur kostur. Har finnast sjey starvsstovur, sum enska stjórnin hevur góðkent júst til hetta endamálið. Umleið 70 prosent av øllum royndum vera fíggjaðar av barnaverndini – Child Support Agency (CSA) - sum roynir at finna fram til pápar, ið royna at sleppa undan at rinda barnapengar.

Men eisini í Bretlandi økist tali á illgrunasomum pápum, ið vilja vita, um teir nú veruliga eru pápar. Kundarnir vera mintir á, hvørjar avleiðingarnar kunnu vera, og at ikki ber til at ógylda úrslitið.

### Virðismikið

Enski professarin John Burn heldur, at DNA-royndir eisini eru virðismiklar.

– Eitt nú, tá móðirin er rýmd við sínum elskara og tann náttúrligi faðirin at barninum vil gera royndir, ið prógva, at hann, og ikki omman á mammusíðuni fær foreldrarættin.

– Tað er serstakliga torført at halda fast við, at ein pápi skal rinda barnapengar í 18 ár, um DNA-kanningar vísa, at hann er ikki faðirin. Men samstundis loypir hetta fjáltur á fólk at hugsa sær, at skildir pápar kunnu taka barnið og í loynd fáa tað DNA-kannað - bert við tí fyri eyga at sleppa undan ábyrgd, sigur John Burn.

Sjálvur trýr enski professarin, at økta nýtslan av DNA-royndum vísir, hvussu ússaligum standi traditionellu familjuvirðini eru, og hvussu skroypilig hjúnabond eru nú á døgum.

Burn viðgongur, at talan er um eymt umráði, men kortini heldur hann tað vera lætt at skilja, hví fólk ynskja at gera nýtslu av DNA-royndum.

– Tað finnast tey, ið halda, at vit skuldu aldrin havt uppdagað so nógv um okkara genir. Men nú ber ikki til at bakka. Og tá til stykkis kemur so rættar henda tøknin upp á skeivleikar, sum hava gingið fyri seg í sera langa tíð - túsundvís av árum, sigur Burn professari.



*Nýggja saltgoymslan á Glyvrum er reist* **Mynd: Edvard Joensen**

# Íslendsk saltsøla á Glyvrum

*Íslendska felagið Hafnarbakki, har Eimskip er partaeigari, fer at lata saltsølu upp á Glyvrum. Høllin er komin upp at standa*

EDVARD JOENSEN

**Glyvrar:** Teir byggja eina nýggja høll uttan fyri Bakkafrost á Glyvrum. Tað er ein nýggj saltsøla, sum skal húsast í bygninginum.

Íslendska felagið Hafnarbakki hevur eina tíð selt salt til føroyingar. Saltið verður flutt í stórum sekkjum við Eimskipum til Føroya.

Men nú fer føroyska smápartafelgið Hafnarbakki at selja salt úr eini nýggjari goymslu á Glyvrum. Eimskip í Føroyum er partaeiggari og fer at reka nýggju saltsøluna á Glyvrum.

Linda Gunnlaugsdótti, stjóri í Eimskip í Føroyum, sigur, at tey nú fara at flyta saltið leyst úr Íslandi. Talan verður um heilar skipslastir í senn.

Saltið, sum Hafnarbakki selur, er av Bahama. Tað verður fyrst flutt úr Caribia til Íslands og so haðani aftur til Føroya.

Linda Gunnlaugsdóttir sigur, at tey hava valt Glyvrar, tí tað liggur so væl fyri at flyta víðari haðani. Fleiri virki eru í Eysturoynni, sum løtt eru at røkka. Og tey vóna sjálvandi at fáa nógvar kundar á leiðini, sigur hon.

Linda Gunnlaugsdóttir veit enn ikki at siga, hvussu nógv fólk fara at fáa arbeiði á nýggju saltsøluni. Og prísin fyri bygningin leggur hon ikki í at upplýsa, sigur hon.